## Messi til OL



Tað verður eitt stjørnusett argentinskt landslið, ið fer til Olympisku leikirnar. Barcelona stjørnan Lionel Messi er saman við Sergio Aguero, Juan Roman Riquelme, Nicolas Burdisso, Fernando Gago og Javier Mascherano úttiknir. At Messi er við í hópinum hjá Argentina hevur við sær, at Barcelona noyðist at vera hann fyriuttan, tá teir skulu royna at spæla seg víðari úr triðja kvalifikationsumfarinum.

## Spania best í heiminum

Nýkosnu europameistararnir eru nú ovasta tjóðin á FIFA-listanum. Føroyar eru nummar 195. Spania er fyri fyrstu ferð ovasta landið á styrkislistanum hjá altjóða fótbóltssamgonguni, FIFA. Sigurin í EM ber við sær, at Spania hevur vunnið sær 254 stig og er farið trý pláss upp á listanum. Frákoyrdu meistararnir úr Grikkalandi hava mist 222 stig, nú EM-sigurin er tvey ára gamal, og eru teir nú nummar 18 á listanum. Talan er eisini um niðurtúr hjá Danmark, sum er nummar 36. Føroyar eru at finna sum nummar 195 á listanum. Tað er eitt pláss lægri, enn vit vóru í juni mánaði.

# Landsliðsleikarar skifta feløg







*Fyrr- og núverandi landsliðsleikarar skifta feløg í hesum døgum*

**Bæði fyrr- og núverandi føroyskir landsliðsleikarar skifta feløg**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Jón Rói Jacobsen til Frem. Súni Olsen til B36 og Janus M. Joensen til AB. Felags er, at teir allir skifta frá einum felag, til annað felag í lægri deild.

### Jón Rói til Frem

Verjuskansin hjá landsliðnum fer komandi kappingarárið at spæla fótbólt í Frem. Hettaváttarumboðsmaðurin hjá Jón Róa, Jákup í Stórustovu. Jón Rói var í vár partur av AaB-hópinum, sum vann gull í donsku superliguni, men sjáldan var føroyski verjuspælarin millum teir fyrstu ellivu. Hartil er Jón Rói framvegis ígongd við at lesa, og skal hetta røkjast fullvæl, so hóskar fótbóltur í næst fremstu donsku deildini betur til ta tíð, sum skal nýtast til lesnaðin, skilst.

### Súni ávegis til B36

Víkingur hevur fingið krakk frá gøtumanninum, sum eftir øllum at døma vil spæla UEFA-Cup við B36. Tað ljóðar fyri vist, at Súni Olsen í kvøld fer at skriva undir sáttmála við B36 fyri restina av kappingarárinum. Súni Olsen spældi í vár við Viborg, sum flutti niður úr donsku superliguni, og síðani hann boðaði frá, at hann ikki heldur fram har, hava fleiri føroysk feløg ligið framvið eftir undirskrift hansara.

Nú er tó líkt til, at tað verður B36, sum fer við spælaranum. Víkingur hevur eisini verið í myndini, men sum skilst, so takkaði Súni Olsen í gjár nei takk til samanlagda liðið úr Gøtu og Leirvík. Mest sannlíkt, tí hann við B36 kann spæla UEFA-Cup, og tá hetta er móti danska Brøndby, kann ein slík uppgerð vera leiðin til nýggjan sáttmála í Danmark.

### Janus M. Joensen til AB

Mánakvøldið skrivaði fyrrverandi landsliðsleikarin og HB-arin Janus Mouritsson Joensen undir sáttmála við AB. Hann skal tískil spæla við 1. deild hjá AB restina av hesum kappingarárinum. Janus, sum er 27 ára gamal, hevur altíð spælt við HB og hevur seinastu sjey árini verið á formulaliðnum hjá teimum.

Janus sigur við AB heimasíðuna, at tíðin nú var komin at royna okkurt nýtt.

– Eg vildi helst vera her í høvuðsstaðnum, og haldi tað kundi verið stuttligt at fingið AB upp í Formuladeildina aftur, sigur Janus M. Joensen.




**Dómarabókin**

| Feløg | GK | RK | Stig |
|---|---|---|---|
| ÍF | 30 | 3 | 39 |
| B71 | 23 | 3 | 32 |
| B36 | 22 | 2 | 28 |
| Víkingur | 28 | 0 | 28 |
| B68 | 24 | 1 | 27 |
| KÍ | 23 | 1 | 26 |
| Skála | 23 | 1 | 26 |
| HB | 17 | 1 | 20 |
| EB/S | 16 | 1 | 19 |
| NSÍ | 16 | 0 | 16 |

| Spælarar | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Símin Hansen | B71 | 2 | 2 | 8 |
| Hans Jørgen Djurhuus | Víkingur | 7 | 0 | 7 |
| Alexander Jovevic | ÍF | 0 | 2 | 6 |
| Balazs Sinko | ÍF | 3 | 1 | 6 |
| Vali Miela | Skála | 6 | 0 | 6 |
| Tamas Nagy | B36 | 5 | 0 | 5 |
| Marni Djurhuus | EB/S | 5 | 0 | 5 |
| Høgni Madsen | ÍF | 5 | 0 | 5 |
| Magnus Skoralíð | Víkingur | 5 | 0 | 5 |

Í yvirlitinum telur gult kort 1 stig. Reytt kort telur 3 stig

**Máltindarnir**

| Formula-deildin | | |
|---|---|---|
| Arnbjørn Hansen | EB/S | 11 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 7 |
| Christian Høgni Jacobsen | HB | 7 |
| Andrew av Fløtum | HB | 6 |
| Rodrigo | KÍ | 6 |
| Andreas Lava Olsen | Víkingur | 6 |
| Karoly Potemkin | B36 | 4 |
| Jann Ingi Petersen | B68 | 4 |
| Gudmund Nielsen | B71 | 4 |
| Bárður Olsen | EB/S | 4 |
| Bartal Eliasen | ÍF | 4 |
| Óli Hansen | NSÍ | 4 |
| Øssur Dalbúð | NSÍ | 4 |

Besti málskjúttin í Formula-deildini fær eftir kappingarárið gylta skógvin frá Thomas Dam Ítrótti

| 1. deild | | |
|---|---|---|
| Johan Eivind R. Mouritsen | TB | 15 |
| Tór-Ingar Akselsen | 07 Vestur | 10 |
| Allan Mørkøre | AB | 10 |
| Tróndur Sigurðsson | AB | 10 |
| Birgir Jørgensen | VB/S | 10 |
| Andrzej Stretowicz | 07 Vestur | 9 |
| Jens Erik Rasmussen | 07 Vestur | 9 |
| Kim Poulsen | 07 Vestur | 8 |
| Dion Splidt | AB | 8 |
| Olivur Abrahamsen | TB | 8 |
| Finnur Justinussen | Víkingur | 8 |

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 13 | 10 | - | 2 | - | 1 | 29 | 13 | 16 | 32 |
| 2 NSÍ | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 21 | 14 | 7 | 24 |
| 3 HB | 13 | 6 | - | 4 | - | 3 | 24 | 11 | 13 | 22 |
| 4 B36 | 13 | 5 | - | 6 | - | 2 | 16 | 9 | 7 | 21 |
| 5 Víkingur | 13 | 5 | - | 3 | - | 5 | 20 | 15 | 5 | 18 |
| 6 KÍ | 13 | 3 | - | 5 | - | 5 | 16 | 22 | -6 | 14 |
| 7 ÍF | 13 | 4 | - | 2 | - | 7 | 16 | 25 | -9 | 14 |
| 8 B68 | 13 | 4 | - | 2 | - | 7 | 9 | 19 | -10 | 14 |
| 9 Skála | 13 | 2 | - | 5 | - | 6 | 10 | 20 | -10 | 11 |
| 10 B71 | 13 | 2 | - | 2 | - | 9 | 13 | 26 | -13 | 8 |

**1. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB/S | 14 | 11 | - | 1 | - | 2 | 35 | 10 | 25 | 34 |
| 2 07 Vestur | 13 | 10 | - | 1 | - | 2 | 57 | 20 | 37 | 31 |
| 3 TB | 15 | 9 | - | 2 | - | 4 | 42 | 12 | 30 | 29 |
| 4 AB | 13 | 9 | - | 1 | - | 3 | 45 | 17 | 28 | 28 |
| 5 HB | 13 | 4 | - | 4 | - | 5 | 20 | 14 | 6 | 16 |
| 6 Víkingur | 13 | 4 | - | 3 | - | 6 | 17 | 34 | -17 | 15 |
| 7 KÍ | 12 | 4 | - | 1 | - | 7 | 18 | 39 | -21 | 13 |
| 8 NSÍ | 14 | 2 | - | 4 | - | 8 | 24 | 43 | -19 | 10 |
| 9 EB/S | 14 | 3 | - | 0 | - | 11 | 13 | 60 | -47 | 9 |
| 10 B68 | 13 | 2 | - | 1 | - | 10 | 16 | 38 | -22 | 7 |